## 800 tons av sild

Beinir fór at sigla í gjárkvøldið við 800 tonsum av sild. Beinir fer at landa í Skagen, skrivar bkv.fo. Hetta er somuleiðis seinasti túrurin fyri jól. Tað er gott veður á leiðini.



# Bert ein gøtumaður í Eystur kommunu



*Tollakur Joensen, uttast til vinstru, er einasti veruliga gøtumaðurin í kommunustýrinum í Eystur kommunu*

**Tá nýggja kommunustýrið í Eystur kommunu, ið verður sett á stovn fyrsta januar, verður talan um eina serliga støðu. Tað varð nevniliga bara ein gøtumaður valdur í gjár**

KOMMUNUVAL
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tá endaliga úrslitið lá greitt fyri Eystur kommunu vóru tað, at síggja til seks leirvíkingar og 3 gøtufólk vald. Hetta kundi borið brá av onkrum, sum líkist eini skjótari samansjóðing, men helst er tað ikki heilt soleiðis. Heldur mann vera talan um atkvøður, ið tilvildarliga hava passa seg soleiðis.



*Mamma Elina V. Olsen var errin í gjár, tá 20 ára gamla dóttirin varð vald í kommunustýrið*

Av teimum trimum, ið eru vald, sum búgva í Gøtu, eru tvey í eini serligari støðu. Bæði Hans Mouritz Foldbo og Hanna Jensen eru uppvaksin í Leirvík og síggja seg ofta sum leirvíkingar. Hetta hevur so við sær, at Tollakur Joensen verður einasti veruliga skurin í Eystur kommunu.

### Borgarstjórarnir valdir

Bæði Fríðgerð Heinesen og Hans Mouritz Foldbo vórðu í gjár afturvald, og áhugavert er um nakar av hesum verður borgarstjóri, tí hvørgin av teimum var á Tjóðveldislistanum, sum gjørdist størsti listin við trimum kommunustýrislimum. Men sambært Fríðgerð Heinesen, taka fólk ikki tað politiska so tungt.

- Tað kann vera, at nøkur hava flutt eftir flokkinum, men nú tey flestu velja onkran ávísan persón og leggja ikki so nógv í, hvør flokkur tað er, sigur Fríðgerð Heinesen.

### Helst yngst valdu

Tað kundi meira enn so hent seg, at Eystur kommuna eisini hevur yngsta kommunustýrislimin í landinum, tí bert 20 ára gamla Elin Vatnhamar Olsen, var sambært seinastu tølunum, níggjundi og seinasti limurin í stýrinum fyri Eystur kommunu.

Í Eystur kommunu var ikki langt ímillum fólkini. Í summum førum var talan bert um eina atkvøðu, sum skilti.

Erik Lervig, formaður í valnevndini, greiðir frá, at atkvøðurnar verða taldar umaftur í dag, so ongin ivi verður um fólkini.

1185 fólk vóru á vali í Eystur kommunu og 1404 hava valrætt.



*Nývaldi Arnfinn Langaard var ein sera fegin maður í gjár*

# Nógv nýggj í Runavík

**Í Runavík eru nógv nýggj fólk vald. Arnfinn Langaard er ein av hesum, og hann metir Magnus Rasmussen vera favoritt til borgarstjórasessin**

KOMMUNUVAL
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Magnus Rasmussen úr Lamba verður mettir at vera favorittur til borgarstjórasessin í Runavík. Eisini er áhugavert, at sera nógv nýggj fólk eru vald í kommununi. Sjey av teimum ellivu eru úr gomlu Runavíkar kommunu, meðan hini fýra er spreidd kring bygdirnar.

Ein, ið er valdur fyrstu ferð í Runavík er Arnfinn Langaard. Hann var sera fegin í gjár, og nógv fýrverk varð skotið úr túninum hjá honum.

- Eg eri bankamaður, so tað verður helst mest fíggjarpolitikkinum eg fari at arbeiða við. Eg roknaði næstan við at koma inn, tí tá eg var liðugur at reka, sá rættiliga gott út, sigur Arnfinn Langaard.

Arnfinn Langaard gjørdi sum nógv onnur í gjár, og beyð fólki heim til sín, til ein bita og okkurt leskandi.

- Eg havi sagt á arbeiðsplássinum, at eg ikki komi til arbeiðis fyrrapartin í morgin, flenti Arnfinn Langgaard í gjárkvøldið.



*Arnfinn Langaard beyð, sum nógv onnur, fólki heim til sín í gjár. Her stendur konan og pískar róma*